Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 138 - 20. juli 2007




# Niðurteljingin hjá

**Nógv hava undrast á, hví so lítið hevur verið at hoyrt til løgmann í sambandi við tey mongu stórmálini, ið hava verið frammi í seinastuni. Eitt nú sølan av Føroya Banka, undirsjóvartunnil í Sandoynna, niðurfisking av toskinum og sjómannafrádrátturin. Sosialurin hevur verið á gátt í Tinganesi og spurt Jóannes Eidesgaard, hví hann ikki í størri mun hevur luttikið í orðaskiftinum og um leiklut hansara sum løgmaður og samgonguleiðari, nú valskeiðið av álvara lækkar móti endanum. Og um vandan fyri ikki at gerast løgmaður eftir komandi val, sum verður í seinasta lagi 19. januar**



*Í síni fjórðu løgmannsrøðu á ólavsøku, sum verður tann seinasta í hesum valskeiðnum, fer Jóannes Eidesgaard at leggja høvuðsdentin á, hvat sitandi samgonga hevur nátt ígjøgnum valskeiðið*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

POLITIKKUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Ólavsøkan nærkast av álvara, og hon er hæddarpunktið hjá einum løgmanni, tí tað er í ólavsøkurøðuni, at løgmaður skal vísa, hvat er komið av skafti seinasta árið. Eisini skal hann greiða bæði Løgtingi og Føroya fólki frá, hvørjar politiskar ætlanir liggja fyri framman.

Fyri Jóannes Eidesgaard er hetta tann týdningarmiklasta røðan í tíðini sum løgmaður, tí komandi røða er tann fjórða í røðini og harvið tann seinasta í valskeiðnum. Neyvan er ov nógv sagt, at løgmannsrøðan í ár í veruleikanum er startskotið til valstríðið, sum av álvara fer í gongd í heyst. Løgtingsval verður í seinasta lagi 19. januar.

Sosialurin hevur verið í Tinganesi og tikið »pulsin« á løgmanni, sum í løtuni situr og kýtir seg við at stykkja ólavsøkurøðuna saman, har serliga nógv eygu og oyru eru vend ímóti honum.

Sjálvt um Jóannes Eidesgaard sær rímuliga avslappaður út, er tað týðuligt, at uppgávan verður tikin í størsta álvara. Hetta er eisini eitt slag av eksamiu, nú hann um minni enn eitt hálvt ár skal upp á vektina hjá veljarunum eftir fyrsta valskeiðið sum fremsti maður í Tinganesi.

Spurdur hví hann hevur verið so lítið at hoyrt og sæð í seinastuni, sigur Jóannes Eidesgaard:

– Tú hevur rætt í, at eg ikki havi staðið í fremstu røð nú í summar, men hetta er nakað, eg sjálvur havi valt. Fyri tað fyrsta havi eg verið burturstaddur í eini tríggjar vikur, har eg millum annað havi fylgt teimum ungu føroyingunum, sum kappast á oyggjaleikinum á Rhodos. Fyri tað næsta haldi eg, at tað er ein skylda hjá mær virða starvið og brúka summarið til at savna kreftir til at tørna til aftur seinni, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann vísir á, at arbeiðsárið hjá einum løgmanni av álvara byrjar aftur á ólavsøku og koyrir uttan slit alt heystið. Í einum valári merkir hetta líka fram til og eftir valið.

– Viðvíkjandi einskiljingum so havi eg altíð havt ta áskoðan, at tað ikki er uppgávan hjá tí almenna at eiga hvørki ein banka, flogfelag ella eina telefyritøku. Tað er ikki endamálið hjá okkum politikarum at reka fyritøkur, men at skapa góðar karmar og lata vinnulívið reka fyritøkurnar, so tær standa seg best. Á henda hátt koma tær øllum samfelagnum til góðar, sigur Jóannes Eidesgaard.

*Torbjørn Jacobsen úr Tjóðveldisflokkinum hevur skotið upp at seta eina nevnd at kanna søluna av Føroya Banka. Hví ikki gera tað, so allir ivaspurningar kunnu fáast av vegnum?*

– Tá tann politiska skipanin hevur verið ígjøgnum eitt orðaskifti, og tá avgerðin er tikin – í hesum føri um Føroya Banka – so nyttar ikki at koma aftur og angra hetta. Einasti, sum atkvøddi ímóti leistinum at einskilja Føroya Banka, var Jenis av Rana. Hetta er týdningarmikið at halda fast um. Stóri meirilutin í Løgtinginum var púra samdur um at gera eina samansetta sølu, so vanligi føroyingurin fekk møguleika at keypa partabrøv. Hesin leisturin endaði við, at útlendskir stóríleggjarar fingu 40 prosent, føroyskir stóríleggjarar 40 prosent og smáíleggjarar 20 prosent. At nógv eru misnøgd við ikki at fáa tað, tey bóðu um, skilji eg væl, men ongin hevði roknað við so ovurhonds stórum áhuga fyri partabrævunum. Í sambandi við líknandi sølur aðrastaðni hava smáíleggjarar fingið í mesta lagi 10-15 prosent, so 20 prosent er munandi hægri, enn tað vanliga. Argumentið at loyva stóríleggjarum inn er, at so er betri trygd fyri, at bankin fær eina professionella nevnd og leiðslu, sum er so týdningarmikið í rakstrinum av eini størri fyritøku, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður sigur seg væl skilja, at tingmenn seta spurningar, men at krevja eina kanning heldur hann týðir uppá, at hesir tingmenn – og serstakliga tjóðveldistinglimir – hava ringa samvitsku yvir teirra egnu avgerð.

### Veikleikar í fiskiskipan

*Føroyska fiskidagaskipanin hevur stundum verið róst til skýggja og stundin fingið skuldina fyri, at eitt nú toskastovnurin er niðurfiskaður. Sambært fiskifrøðingum er veiðuorkan í føroyska flotanum alt ov stór, og trýstið á stovnarnar gerst hareftir. Hesum eru nógvir*